# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2011

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini

Seinastu árini hava verið sera avbjóðandi fyri føroyska vinnu við fíggjarkreppu og lítlum vøkstri í búskapinum, men nú sær út til, at viðurskiftini eru við at koma í javnvág aftur.

Arbeiðsloysið er fallið nakað og er nú 5,6 % í mun til 7,2 % fyri einum ári síðani. Hetta er jaligt, hóast arbeiðsloysið enn er væl hægri, enn tað hevur verið seinastu 10 árini.

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum hjá vinnuni í 2011 sæst, at lønarútgjaldingarnar eru góðar 350 mió. kr. lægri enn tær vóru í 2008, meðan lønarútgjaldingarnar hjá tí almenna eru hækkaðar við 190 mió. kr. Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at tað serliga er byggivinnan, sum hevur havt stórt fall í lønarútgjaldingum, men eisini fiskiídnaðurin, annar ídnaður og flutningsvinnan hava havt stórt fall í lønarútgjaldingum. Fiskiveiða, alivinna og shippingvinnan hava tó havt vøkstur. Innan tað almenna eru tað serliga kommunurnar og mentamál, sum hava havt stóran vøkstur í lønarútgjaldingunum.

Fiskivinnan hevur framvegis stórar avbjóðingar, serliga undir Føroyum. Fiskiskapurin er framvegis sera vánaligur. Veiðan eftir toski og hýsu umframt upsa, sum hevur verið álitið seinastu nógvu árini, er metlág. Orsakað av, at marknaðirnir hava tikið seg væl uppaftur í mun til 2008, sæst vánaligi fiskiskapurin ikki aftur í lønarútgjaldingunum.

Alivinnan hevur havt góðar umstøður á marknaðinum seinastu árini. Útlitini fyri 2012 vóru ikki góð, men marknaðurin hevur víst seg at vera munandi betri enn væntað. Lívfrøðiliga gongur eisini væl í alivinnuni, men tað er ein avbjóðing at halda laksalúsini niðri. Hetta tekur alivinnan í størsta álvara og arbeiðir áhaldandi við hesum.

Byggivinnan hevur havt trupul ár síðan 2008 – minkandi lønarútgjaldingarnar tala fyri seg. Tað sær tó út til, at støðan er stabiliserað nakað, uttan at nøkur framgongd tó er at hóma. Tað almenna hevur sett munandi upphæddir av fyri at økja virksemi, men tað vísir seg at ganga sera drúgv tíð, áðrenn hesar ætlanir gerast veruleiki. Hetta er ein avbjóðing fyri byggivinnuna serliga.

Aðrar tænastuvinnur hava eisini verið gjøgnum drúgva tillaging orsaka av minkandi virksemi, og fleiri fyritøkur eru steðgaðar. Tær fyritøkurnar, sum eftir eru, lata misjavnt at. Tað eru tó ávísir glottar at hóma, og fyritøkurnar meta, at 2012 fer at roynast heldur frægari enn undanfarnu árini.

## Fiskivinnan, arbeiðsmegin og skatturin

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at hava vakið eyga við tí, sum hendir á vinnupolitiska økinum og í samfelagnum annars.

Í Føroyum búgva sløk 50.000 fólk, sum vilja hava eitt livistøði, sum er kappingarført í mun til londini kring okkum. Vit hava tó nakrar stórar avbjóðingar, sum loysn má fáast á.

Nýskipan er neyðug á flestu økjum. Henda nýskipan skal hava til endamáls at fáa tamarhald á útreiðslunum og at fáa inntøkurnar til samfelagið upp. Serliga er tørvurin stórur innan fiskivinnuna, og atgongdin til arbeiðsmegi er eisini sera týdningarmikil. Nýskipan av skattaskipanini er gjørd, og var hetta sera tiltrongt.

Í hesi ársfrágreiðingini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at seta ljósið á trý økir: fiskivinnuna, arbeiðsmegina og skattin.

- Fiskivinnan undir Føroyum forvinnur ikki pening, og lítil framburður er at hóma. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at fremsta orsøkin til hetta er, at fiskastovnarnar eru ov illa umsitnir. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er altumráðandi, at henda støða verður tikin í størsta álvara, og at skipað verður soleiðis fyri, at heimaflotin fæst at bera seg fíggjarliga. Hetta skal ikki gerast við studningsskipanum, men við góðari stovnsrøkt og tillaging av flotanum.

  Støðan í fiskivinnuni ber boð um, at tað er heilt galið við okkara fiskivinnupolitikki. Føroya Arbeiðsgevarafelag kann tó fegnast um, at landsstýrið ætlar at orða ein nýggjan fiskivinnupolitikk. Tað er týdningarmikið, at lyklaorðini fyri einum nýggjum fiskivinnupolitikki eru lønsemi og lívfrøðilig burðardygd, og vil Føroya Arbeiðsgevarafelag staðiliga heita á landsstýrið at skipa soleiðis fyri.

  Makrelorrustan, sum hevur leikað seinastu tvey árini, ber boð um, at neyðugt er við einum samanhangandi fiskivinnupolitikki, ið hevur sum fremsta mál at fáa lønsemi í fiskiflotan. At rættindini at fiska makrel verða brúkt sum studningur til skipabólkar,

sum hava vánaligt lønsemi, er ikki rætt og útsetir neyðugu tillagingina av flotanum til tað tilfeingið, sum er.

- Fólkið er dýrabarasta tilfeingi, eitt land hevur, og neyðugt er at fremja trivnað og fólkavøkstur. Stóra undirskotið av kvinnum í føroyska samfelagnum og tann sannroynd, at ungar kvinnur í størri mun velja Føroyar frá eftir lokna útbúgving, er ein álvarsom hóttan, sum vit øll eiga at taka í størsta álvara.

  Búskaparvøstur er lykilin til at stabilisera hesa støðuna nakað, men neyðugt er eisini við átøkum fyri at skapa møguleikar fyri ungdómin her á landi, soleiðis at unga ættarliðið kann støðast her.

  Her hava bæði vinnan og almenna skipanin ábyrgdina fyri, at nakað munagott verður gjørt á hesum øki. Eisini má hugburðsbroyting til soleiðis, at ungdómurin sær Føroyar sum eitt natúrligt stað at búleikast og virka.

- Nýskipan var gjørd av skattaskipanini um ársskiftið. Hetta var neyðugt og tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við framdu nýskipanini. Flestu fyritøkur siga, at tað er lættari at fáa fólk til arbeiðis, umframt at hugurin at átaka sær fleiri tímar er øktur. Fyritøkurnar staðfesta, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum somuleiðis er øktur.

  Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tí, at tað er sera umráðandi, at virknaðurin av nýskipanini fær loyvi til at standa sína roynd, og at kommunur og land eiga at áseta fleiri nýtslugjøld, men bert um endamálið er framhaldandi at lækka skattin á lønum. Hetta skal tó bert gerast í teimum førum, har tað er skilagott, og har nýtslugjøldini kunnu verða við til at tálma almennu útreiðslurnar.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við fakfeløgini er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nýggj samráðingarrunda byrjaði við samráðingunum við tey fimm arbeiðarafeløgini um sáttmálarnar, sum gingu út hin 1. mai í ár.

Semjan við arbeiðarafeløgini endaði við einari hækking í lønum og øðrum ágóðum, sum svarar til 3,02 % yvir tvey ár. Hesar samráðingar eru grundleggjandi fyri alla samráðingarrunduna, og leggja tær soleiðis karmin fyri allar samráðingarnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í hesi samráðingarrunduni.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at samráðingarpartarnir hesuferð tóku ábyrgdina av at vera týdningarmiklir leikarar í føroyska samfelagnum á seg, og tað eydnaðist soleiðis eisini at koma á mál, uttan at neyðugt varð at tilkalla semingsmanning. Hetta er at fegnast um. Stutt eftir samráðingarnar við arbeiðarafeløgini skrivaði Føroya Arbeiðsgevarafelag undir sáttmála við Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar, sum arbeiða á landi. Hesin sáttmáli hevði sama lønarkarm, sum sáttmálin við arbeiðarafeløgini.

**8. juni 2012**

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Bergur Poulsen, formaður**

## INNIHALDSYVIRLIT

**FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI** ..... 1

**INNGANGUR** ..... 2

**HVAT ER NÚ AT GERA? TILMÆLI FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** ..... 3

FISKIVINNAN – FOKUS Á LØNSEMI OG BURÐARDYGD ..... 3
*Nýggja kós í fiskivinnupolitikkinum* ..... *4*
*Makrelur til samfelagsins besta* ..... *4*
*Støðugur fiskivinnupolitikkur* ..... *4*
ATGONGDIN TIL ARBEIÐSMEGI Í FRAMTÍÐINI ..... 5
*Kvinnur og ungdómur manglar* ..... *5*
*Dygdin á arbeiðsmegini* ..... *6*
*Pensiónsnýskipan* ..... *7*
NÚ LOYSIR TAÐ SEG BETRI AT ARBEIÐA ..... 8
*Skattur á lønarinntøku* ..... *8*
*Hvat sigur vinnan um broytta skattin?* ..... *8*
*Kommunuskatturin* ..... *9*
*Nýtslugjøld* ..... *9*

**MÁL Í 2010 OG 2011** ..... 10

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2011-2012** ..... 11

*Samráðingar í samráðingarrunduni 2010 - 2012* ..... *11*
*Samráðingar við Maskinmeistarafelagið um sáttmálan á landi* ..... *11*
*Samráðingar við manningarfeløgini* ..... *11*
*Samráðingar við Føroysk Miðlafólk* ..... *11*
*Samráðingar við Flogskiparafelag Føroya* ..... *11*
*Samráðingarrundan 2012 – 2014 er byrjað* ..... *11*

**TILTØK 2011-2012** ..... 13

*Vinnunám* ..... *13*
*Vinnudagurin 2011* ..... *13*

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** ..... 15

FISKI- OG FLAKAVINNAN ..... 15
*Útflutningurin* ..... *15*
*Rávørutilgongdin* ..... *15*
*Flakavinnan* ..... *15*
ÚTLITINI FYRI FISKIVEIÐU OG FRAMLEIÐSLU ..... 16
*Fiskiskapurin* ..... *16*
*Marknaðurin* ..... *16*
ALIVINNAN ..... 17
*Útflutningsvirðið* ..... *17*
HANDVERKSVINNAN ..... 18
*Gongdin í handverksvinnuni* ..... *18*
*Útlit fyri handverksvinnuna* ..... *20*
SHIPPINGVINNAN ..... 20
KT-VINNAN ..... 21
SAMSKIFTISVINNAN ..... 21
HANDILSVINNAN ..... 21
FERÐAVINNAN ..... 22
PENINGASTOVNARNIR ..... 23

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS** ..... 26

**HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM?** ..... 27

**NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** ..... 27

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Ongantíð er hesin leiklutur meira týdningarmikil enn í hesum døgum, tá búskapir um allan heimin, eisini tann føroyski, hava trupulleikar.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2011 nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti hava serligan týdning næstu tíðina. Hetta fyri at skapa loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit koma styrkt burturúr búskaparliga aldudalinum, vit eru í.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur valt at fokusera uppá hesi:

- Lønsemi í fiskivinnuna
- Atgongdin til arbeiðsmegi í framtíðini
- Nú loysir tað seg betri at arbeiða

# Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Fiskivinnan – fokus á lønsemi og burðardygd*

Fiskivinnan er ein sera týðandi partur av føroyska búskapinum, og nógv tann størsti parturin av útflutningsvirðinum hjá Føroyum stavar frá fiskivinnuni. Tí er alneyðugt, at politiska umsitingin av fiskivinnuni er støðug og hevur til endamáls at skapa so stórt búskaparligt virði burturúr tilfeinginum sum gjørligt.

Tað er eingin loyna, at fiskivinnan undir Føroyum hevur havt sera vánalig úrslit seinastu árini. Feskfiskaflotin hevur samanlagt havt undirskot síðan 2006, og hetta er sjálvsagt ikki ein haldgóð støða – hvørki fyri vinnuna ella fyri samfelagið. Meðan flotin í hesum tíðarskeiðinum hevur havt stórt hall, hevur fjarfiskiflotin havt betri úrslit.

Fiskiskapurin eftir botnfiski undir Føroyum verið metlágur seinastu fimm árini, og hetta sæst sjálvsagt á úrslitinum hjá feskfiskaflotanum. Ongantíð áður hava nøgdirnar av toski og hýsu verið so lítlar í eitt so langt áramál. Hetta bendir á, at umsitingin av okkara botnfiskastovnum ikki hevur verið nóg góð seinastu árini. Hesum má politiska skipanin taka hædd fyri og gera nakað við.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað tí er alneyðugt, at politiska skipanin tekur støðuna í álvara og skipar soleiðis fyri, at tann føroyski heimaflotin aftur fæst at bera seg. Hetta skal ikki gerast við nýggjum studningsskipanum, men við góðari stovnsrøkt og tillagingum í flotanum.




Myndin omanfyri vísir veiðuna eftir toski, hýsu og upsa seinastu árini. Nøgdirnar hava verið sera vánaligar seinastu árini, og tað ber boð um, at stovnarnir ikki hava verið røktir nóg væl Kelda: www.hagstova.fo

Myndin omanfyri vísir veiðuna eftir botnfiski undir Føroyum seinastu tíggju árini, og tølini tala fyri seg. Meðan veiðan eftir toski og hýsu hevur verið sera vánalig í fleiri ár, hevur veiðan eftir upsa hilnast eitt sindur betur.

Seinastu tvey árini er veiðan eftir upsa eisini minkað nógv. Havstovan metir, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri, men at veiðutrýstið framvegis er ov høgt. Hesa ráðgeving eiga vit at taka til eftirtektar.

Fiskiskapurin eftir toski og hýsi hevur síðan 2004 verið minkandi ár fyri ár. Seinastu fimm árini hevur veiðan eftir toski undir Føroyum ligið millum 10 og 14 túsund tons, og veiðan eftir hýsu hevur seinastu fýra árini verið nøkur fá túsund tons. Um vit høvdu eitt skynsamt veiðutrýst kundi veiðan eftir toski verið umleið 25.000 tons og veiðan eftir hýsu eini 15.000 tons. Sostatt missa vit stórar inntøkur orsakað av vánaligari stovnsrøkt.

Fiskiskapurin eftir botnfiski undir Føroyum er tískil sera vánaligur og ber boð um ein fiskivinnupolitikk, sum ikki hevur megnað at røkja stovnarnar skynsamt og burðardygt – har stovnarnir sleppa at koma fyri seg aftur og skapa eina javna tilgongd til stovnin.

At stovnarnir eftir øllum at døma verða ov hart troyttir ávirkar ikki bert sjálvan fiskiflotan, men eisini restina av samfelagnum. Tí hava allir føroyingar ein áhuga í, at stovnsrøktin verður raðfest hægri komandi árini.

## Nýggja kós í fiskivinnupolitikkinum

Sera vánaligu fíggjarligu úrslitini og vánaligi fiskiskapurin er ein greið ábending um, at okkurt er heilt galið við okkara fiskivinnupolitikki. Lítil ivi er um, at heimaflotin skal ígjøgnum eina tillaging, soleiðis at fiskiorkan samsvarar betur við tær nøgdir, sum vit kunnu veiða undir Føroyum.

Sjálvt um talið av skipum undir Føroyum er minkað nógv seinastu tíggju árini, bendir alt á, at heimaflotin framvegis er ov stórur.

Vit kunnu sostatt staðfesta, at hvørki tey fíggjarligu ella tey lívfrøðiligu úrslitini av verandi fiskivinnupolitikki hava verið nøktandi. Tá úrslitini eru so vánalig, má politiska skipanin hyggja eftir, hvørjar broytingar kunnu fremjast til frama fyri føroyska fiskivinnu og samfelagið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri ár gjørt vart við, at stovnsrøktin undir Føroyum ikki tryggjar optimala úrtøku burturúr okkara fiskastovnum. Heldur enn at falla fyri freistingini at fiska ov nógv, tá stovnarnir eru væl fyri, eiga vit at fiska ta nøgd, sum gevur okkum størst varandi úrtøku, soleiðis at vit í longdini kunnu fáa meira burturúr. Vit eiga tí at taka ráðgevingina frá Havstovuni í størri álvara.

Ein annar trupulleiki er, at landið veitir fiskivinnuni studning gjøgnum ein serligan skattafrádrátt til sjófólk. Hetta merkir, at fiskivinnan fær studning til at keypa sær arbeiðsmegi framum aðrar vinnur á landi. Hetta ger, at flotin er størri, enn hann annars hevði verið, um starvsfólk í fiskivinnuni skuldu rinda sama skatt sum onnur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri ár mælt til at avtaka serliga frádráttin til sjómenn, soleiðis at ávísar vinnur ikki fáa framíhjárættindi, og soleiðis at fiskivinnan framhaldandi kann tillaga seg samsvarandi veiðumøguleikunum.

## Makrelur til samfelagsins besta

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við, at Føroyar krevja sín rætt og krevja ein størri part av makrelkvotuni. Trupulleikin er tó, at hetta tilfeingið verður býtt út til allar skipabólkar, hóast hesi ikki eru útgjørd til at fiska makrel. Hóast hetta óivað kemur væl við hjá einstøkum reiðaríum, elvir hetta eisini til ein meira ineffektivan fiskiskap og minni virðisøking.

Tann samlaða virðisøkingin av makrelkvotuni verður sostatt nógv minni, enn hon kundi verið, um makrelurin varð veiddur av teimum mest effektivu fiskiførunum, sum vit hava í flotanum. Trupulleikin er, at í staðin fyri at tillaga heimaflotan, verður makrelurin í veruleikanum nýttur sum stuðul til heimaflotan, sum ikki ber seg fíggjarliga. Hetta er bert við til at útseta ta tillaging, sum flotin natúrliga eigur at fara ígjøgnum, og kann økta makrelkvotan tí eisini hava óhepnar avleiðingar.

Fremsta uppgávan hjá politiska myndugleikanum í løtuni er ikki at ganga øllum ynskjum á møti, men at tryggja, at hetta tilfeingið verður fiskað og virðisøkt so skilagott sum gjørligt. Somuleiðis skulu krøv setast teimum, sum sleppa at troyta tilfeingið, soleiðis at samfelagið fær mest burturúr í longdini.

## Støðugur fiskivinnupolitikkur

Tað er umráðandi, at politiska skipanin ger langtíðarsemju um, hvussu okkara fiskivinna skal skipast. Hetta fyri, at vinnan skal vita, hvussu hon skal skipa sítt virksemi frameftir.

Seinastu árini hevur nógv kjak verið um tilfeingisgjald, men torført er at finna ein leist fyri hesum. Í fjør rindaðu fyritøkur í fiski- og alivinnuni ein eyka skatt uppá 2,5 prosent av yvirskoti omanfyri 1 mió. kr.

Harafturat varð tilfeingisgjald lagt á makrelin, og ein partur varð seldur á uppboðssølu. Í ár er ein annar leistur valdur, og næsta ár kunnu vit aftur vænta okkum eina nýggja skipan. Løgmaður hevur nevniliga boðað frá, at 1. januar 2013 skal tilfeingisgjald leggjast á allan fisk.

Hetta ger umstøðurnar hjá vinnuni ótryggar, tá vinnan ikki veit, hvussu tilfeingisgjaldið verður skipað árið eftir. Tí er neyðugt at fáa hetta í eina fasta legu. Vandin við tilfeingisgjaldinum í løtuni er, at gjaldið verður ásett eftir tørvinum hjá landskassanum, og tí ávarar Føroya Arbeiðsgevarafelag staðiliga ímóti.

Býtið av makrelinum hevur eisini víst, at okkum tørvar eina skipan, sum tryggjar, at hetta býtið tryggjar størst møguliga virðisøking, og at býtið ikki broytist ár eftir ár. Býtið av makrelkvotuni hevur eisini verið broytt frá 2011 til 2012, og hetta ber heldur ikki boð um eina skipan, ið gevur vinnuni støðugar karmar.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur boðað frá, at ein arbeiðsbólkur skal setast at geva politisku skipanini eitt tilmæli til, hvussu føroyskur fiskivinnupolitikkur skal skipast komandi árini. Samgongan hevur sostatt sett sær fyri at gera broytingar í fiskivinnupolitikkinum. Vónandi kann hetta beina føroyskan fiskivinnupolitikk aftur á beint.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er sannført um um, at fiskivinnan undir Føroyum kann bera seg uttan studning. Tað ræður bert um at skipa soleiðis fyri, at stovnarnir verða troyttir lívfrøðiliga burðardygt, og at flotin samsvarar við tað, sum vit kunnu veiða. Soleiðis fáa vit lønsemi aftur í fiskivinnuna undir Føroyum.

Tilmæli:

- At vit gagnnýta føroyska fiskatilfeingið, soleiðis at vinnan og føroyska samfelagið fær sum mest burtur úr.
- At lívfrøðilig burðardygd skapar grundarlag fyri eini fíggjarligari haldførari fiskivinnu
- At vit áhaldandi stríðast fyri okkara fiskiveiðurættindum í altjóða samráðingum.
- At stuðulsskipanir til arbeiðsmegina í fiskivinnuni verða tiknar burtur.

## *Atgongdin til arbeiðsmegi í framtíðini*

Fólkið er dýrabarasta tilfeingið, sum eitt og hvørt land hevur, og fólkavøkstur er sostatt avgerandi fortreytin fyri, at eitt land kann klára seg væl búskaparliga. Føroyska fólkagrundarlagið er ógvuliga lítið, og føroyska búskapareindin líður undir, at vit ikki hava sonevnda kritiska massan (sambært frágreiðing hjá OECD). Hetta merkir, at lága fólkatalið í Føroyum ger, at fíggjarliga grundarlagið fyri nógvum virksemi er ivasamt.

Vit eru sløk 50.000 fólk. Vit fáa - við okkara 2,3 børnum fyri hvørja kvinnu - lutfalsliga nógv børn samanborið við onnur Norðurlond, men hóast hetta er fólkatalið í Føroyum lækkað seinastu árini. Lutfalsliga stórt undirskot er av kvinnum í arbeiðsførum og burðardyggum aldri, og nærum helvtin av okkara unga fólki, ið leitar sær uttanlands í útbúgvingarørindum, kemur ikki aftur her at búleikast eftir loknan lestur. Ein meting hjá Stuðulsstovninum sigur, at umleið 150 ung í hvørjum árgangi koma ikki aftur til Føroya. Hetta er eitt álvarsmál og eigur at viðgerast hareftir.

### Kvinnur og ungdómur manglar

Undirskotið av kvinnum og tann sannroynd, at stórur partur av teim ungu velja ikki at koma aftur til Føroya eftir loknan lesnað, er ein stór avbjóðing fyri samfelagið, og fylgjurnar av hesum verða alstórar.

Í løtuni hava vit eitt undirskot av kvinnum uppá meira enn 2.000 persónar. Tað eru serliga yngru ættarliðini av kvinnum, sum velja at flyta úr Føroyum, og bert ein partur kemur aftur. Tað er greitt, at við einum stórum undirskoti av kvinnum verður trupult at fáa fólkavøkstur í Føroyum.

Um vit taka árið í fjør sum dømi, so var nettofráflytingin av kvinnum í aldrinum 20 til 24 ár umleið 210. Kvinnur í aldursbólkinum 15-35 ár gerast alsamt færri her á landi, og tað er ein sera vandamikil gongd fyri samfelagið Føroyar. Hetta eru tær, ið skulu seta nýggj ættarlið av føroyingum í heim. Hetta er við til at skapa eina ónda ringrás, har barnatalið støðugt fer at lækka. Hetta er orsøkin til, at færri ung fara at vaksa upp her í Føroyum, og færri verða at seta nýggj ættarlið í verðina.

Síðan 2004 hava vit nærum øll árini havt eina nettofráflyting. Vit hava áður havt stóra nettofráflyting, men tá hevur tað lutfalsliga høga burðaravlopið havt við sær, at fólkatalið ikki er lækkað so nógv. Føroyskar kvinnur hava átt fleiri børn enn kvinnur í grannalondunum, og tað hevur hildið fólkatalinum uppi. Gongdin seinastu árini hevur tó verið, at burðaravlopið eisini er minkað, soleiðis at tað nú er minni enn nettofráflytingin. Úrslitið er minkandi fólkatal.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er alneyðugt, at myndugleikarnir seta sær fyri at venda gongdini beinanvegin.

Tá vit frammanundan eru so fá, kann týdningurin av fólkavøkstri í Føroyum ikki yvirmetast, og Føroyar eru tískil eisini ógvuliga viðbreknar, tá talan er um fráflyting.

Trupulleikin minnir nakað um kjakið um hønuna og eggið, hvør kom fyrst. Fólkavøkstur er avgerandi fyri menningina av føroyska samfelagnum, men samstundis er menning av føroyska samfelagnum ein fortreyt fyri, at fólk støðast her, og  at fólk koma aftur eftir eitt lív sum útisetar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er av tí fatan, at búskaparvøkstur er ein lykil til, hvussu vit kunnu fáa fólk at støðast og trívast í Føroyum. Hava vit búskaparvøkstur, fáa vit eisini fólkavøkstur.

Tað eru helst fleiri hættir at fáa tey ungu, sum eru í lestrarørindum í øðrum landi, at flyta heimaftur. Ein máti er, at vinnan og tað almenna gera alt, sum er í teirra makt fyri at inkludera tey, sum eru undir útbúgving, í føroyska samfelagið. Hetta kann t.d. gerast við at bjóða teimum at vera við til at lýsa og loysa ymiskar vinnuligar og samfelagsligar spurningar, sum part av teirra útbúgving.

Kanningar vísa, at umleið ein triðingur av teimum, sum flyta av landinum í lestrarørindum, høvdu ikki flutt, um útbúgvingin var í Føroyum. Hetta merkir, at gongdin kundi verið vend, um fleiri útbúgvingar vórðu settar á stovn í Føroyum.

Somuleiðis heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at dimittendsatsur fyri arbeiðsleys eigur at verða innførdur, soleiðis at ung eftir lokna førleikagevandi útbúgving kunnu gerast partur av ALS tryggingarskipanini. Triðja tiltakið er hugburðsbroyting, og er tað uppgávan hjá teimum, sum búgva í Føroyum at ynskja og vilja tey ungu - øvugt, at tey ungu ynskja og vilja at koma aftur til Føroyar at gera mun fyri hetta samfelagið.

## Dygdin á arbeiðsmegini

Sum nevnt omanfyri er neyðugt við eini fjølmentari arbeiðsmegi. Hetta er tó ikki nóg mikið.

Okkara arbeiðsmegi má eisini vera dygdargóð, og hetta tryggja vit við einum munagóðum skúla- og útbúgvingarpolitikki. Føroyar mugu hava dygdargóðar útbúgvingar frá fólkaskúla til miðnám og hægri útbúgvingar. Eisini er umráðandi, at vit hava ein útbúgvingarpolitikk í mun til útbúgvingarmøguleikar uttanlands. Sum pinkuland verða vit ongantíð før fyri at hava eitt fullfíggjað úrval av útbúgvingarmøguleikum til okkara ungdóm.

Vit kunnu tó siga teimum ungu, hvørjum førleikum, vit hava brúk fyri, og framhaldandi virka fyri at tryggja teimum møguleikan at fáa hesar førleikar uttan fyri Føroyar.

Møguleikin fyri at taka partar av útbúgvingum í Føroyum eiga eisini at verða útbygdir.

Hóast hetta er eingin ivi um, at vit eiga at seta okkum sum mál at hava munandi fleiri útbúgvingar enn nú. Vit mugu eisini seta okkum sum mál, at okkara skúlaskipanir – frá fólkaskúla til hægri útbúgvingar - virka væl, og at útbúgvingarnar eru á nóg høgum og á kappingarførum støði. Hetta krevur, at undirvísingarførleikarnir eru teir hægst møguligu, og at framúr undirvísingartilfar og útgerð, umframt hjálparútgerð annars, eru tøk.

Fyri at eftirkanna støðið á okkara útbúgvingum luttaka Føroyar í eftirmetingum av fólkaskúlanum (PISA), meðan eingin eftirmeting verður gjørd av miðnámsútbúgvingum, yrkisútbúgvingum ella hægri útbúgvingum. Metingar verða heldur ikki gjørdar av undirvísingarførleikunum í skúlunum.

Einasta úrslit vit hava at halda okkum til, eru úrslitini frá PISA-kanningunum, og tey eru langt frá nøktandi. Tá tílík úrslit vísa seg, er neyðugt, at munagóð tiltøk verða sett í verk. Tilvildarlig spariátøk, eitt nú at skerja undirvísingartímar, mugu ikki seta eina mennandi tilgongd av fólkaskúlanum í vanda. Hugsað má verða um hvørja krónu, tvs. effektiviseringar mugu til. Umráðandi er, at størri skúlaeindir verða skipaðar, soleiðis at vit fáa best møguligu undirvísingina fyri minst møguligan pening.

Hóast vit nýta stórar upphæddir til serundirvísing, hoyra vit javnan um vantandi ella ov vánaliga serundirvísing. Hesi viðurskifti mugu fáast í rættlag, so at øll børn og ung fáa grundleggjandi førleikar. Vit hava ikki ráð at missa partar av framtíðar arbeiðsmegini niður ímillum.

Landsstýrið hevur boðað frá, at arbeitt verður við at endurskoða bygnaðin í fólkaskúlanum við tí endamáli at fáa størri eindir, sum kunnu geva eitt betri undirvísingartilboð. Hetta er gott og neyðugt, og Føroya Arbeiðsgevarafelag vónar, at landsstýrið stendur við hesa fráboðan og fær gjøgnumført

hetta tiltak, sum øll kanska ikki eru so glað fyri. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað eisini er neyðugt at endurskoða lóggávuna á fólkaskúlaøkinum við tí fyri eyga at bøta um góðskuna, og eigur hetta at verða næsta stig.

Fyri vinnuna er tað avgerandi, at skúlarnir geva børnum og ungum so mikið av førleikum, at tey kunnu lúka tey støðugt hækkandi førleikakrøvini á arbeiðsmarknaðinum.

## Pensiónsnýskipan

Seinastu umleið 15 árini hevur verið tosað um, at ein pensiónsnýskipan skal setast í verk í Føroyum. Arbeiðsbólkar og uppskot um hetta eru nógv í tali, og enn vantar nakað í, áðrenn tað er tryggjað við lóg, at allir føroyingar skulu spara upp til egna eftirløn. Hetta er ein stór samfelagsavbjóðing og fyri hvørt ár, sum gongur, gerst henda avbjóðing størri. Demografisku broytingarnar, sum raka flestu evropisku samfeløg, raka eisini Føroyar, og framrokningar vísa, at í 2040 eru tvey í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensiónist í mun til fýra í dag.

Hetta er ein álvarsamur trupulleiki, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at nýggj pensiónslóggáva má fáast uppá pláss beinanvegin.

Fólkapensiónin varð samtykt í 1958, og pensiónsaldurin varð tá settur til 67 ár. Síðani er miðallivialdurin hækkaður munandi, men pensiónsaldurin er framvegis hin sami. Í 1975 livdi ein pensiónistur í miðal 12 ár, eftir at hann varð pensióneraður, meðan ein pensiónistur í 2045 kann vænta at liva næstan 20 ár, eftir at hann er vorðin 67 ár.

Pensiónsaldurin hevur verið nógv umrøddur seinastu tíðina. Stórt rok kom í, eftir at samgongan, í sambandi við at fíggjarkarmarnar fyri komandi fíggjarár vóru til viðgerðar, vísti á, at pensiónsaldurin mátti hækka. Um hugt verður eftir tølunum omanfyri, átti tað tó ikki at undra nakran, at neyðugt er at hækka pensiónsaldurin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tíðin er komin til eitt sakligt kjak um hækking av pensiónsaldrinum. Sjálvandi eigur hetta at verða gjørt við eini skiftisskipan, soleiðis at einstaki føroyingurin fær fyrireikað seg til broytingarnar. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at tann leistur, sum pensiónsbólkurin upprunaliga arbeiddi við, var skilagóður, og hann skuldi verið tikin framaftur.

Tilmæli:

- Áhaldandi at leggja dent á at framtíðartryggja eina vælútbúna arbeiðsfjøld
- At fleiri hægri útbúgvingartilboð verða stovnsett í Føroyum.
- At nýútlærd við førleikagevandi útbúgvingum skulu gerast partur av ALS-tryggingarskipanini
- At øll ung fáa eina miðnámsútbúgving ella yrkisútbúgving, umframt at so nógv sum gjørligt fáa eina førleikagevandi útbúgving
- At effektiviseringar verða gjørdar av í skúlaverkinum. Vit mugu fáa best møguligu undirvísingina fyri minst møguligan pening.
- At fráboðaðu bygnarligu broytingarnar í fólkaskúlanum verða gjøgnumførdar
- At ætlaða pensiónsnýskipanin verður sett í verk beinanvegin, herundir at
- gera eina skiftissskipan fyri, hvussu pensiónsaldurin kann hækka
- Broyta pensiónsreglurnar, soleiðis at tað skal loysa seg at arbeiða hjá pensionistum.

## *Nú loysir tað seg betri at arbeiða*

Arbeiðsfjøldin er okkara týdningarmiklasta tilfeingi yvirhøvur. Myndugleikarnir skulu tí altíð hava sum endamál at hava eina væl lærda og dygdargóða arbeiðsfjøld umframt at syrgja fyri, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða.

Stuðul vegna arbeiðsloysi ella aðrar sosialar veitingar má ongantíð gerast so høgur, at fíggjarliga eggjanin til at arbeiða er í vanda.

Tað skal altíð loysa seg at vera virkin á arbeiðsmarknaðinum.

## Skattur á lønarinntøku

Fyri vinnuna hevur ikki bara partafelagsskatturin týdning. Lønarinntøkuskatturin er avgerandi fyri lønarkostnaðin og ikki minst fyri hugin hjá fólki at arbeiða.

Hagtølini hava staðfest, at serliga føroyskar kvinnur arbeiða niðursetta tíð. Atgongd til tøka arbeiðsmegi verður væntandi ein stór avbjóðing í framtíðini, og tí mugu vit syrgja fyri, at vit í Føroyum ikki eisini skulu stríðast við, at føroyska arbeiðsfjøldin ikki hevur hug at arbeiða vegna ov høgt skattatrýst.

Skattur á lønarinntøku má tískil ongantíð vera so høgur, at tað illa loysir seg at arbeiða fulla tíð ella at arbeiða ein tíma eyka.

Í Vinnusjónarmiðum Føroya Arbeiðsgevarafelags "Koyrið so á motorin", sum felagið gav út á heysti 2011, vísti felagið á, at neyðugt var at lækka skattin á seinast vunnu krónuni fyri at økja um hugin hjá fólki at átaka sær eyka arbeiðið.

1. jan. 2012 fingu vit eina nýskipan av skattaskipanini, og skattastigin er nú munandi flatari, enn hann var. Talvan niðanfyri vísir, at marginalskatturin fyri eina inntøku uppá 200.000 kr. og 400.000 kr. í eini miðal kommunu er 44,96 %. Fyri eina inntøku uppá 600.000 kr. er marginalskatturin 48,71 %. Her er roknað við einum arbeiðsmarknaðargjaldi uppá 3,72 %.

| Ársinntøka | 200.000 | 400.000 | 600.000 | 800.000 | 1.000.000 |
|---|---|---|---|---|---|
| Marginalskattur í gomlu skattaskipanini (2011) uttan gjøld | 42,34% | 56,34% | 56,34% | 56,34% | 50,00% |
| Marginalskattur í gomlu skattaskipanini (2011) við gjøldum | 45,71% | 59,71% | 59,71% | 58,71% | 52,37% |
| | | | | | |
| Marginalskattur í nýggju skattaskipanin (2012) uttan gjøld | 41,34% | 41,34% | 46,34% | 46,34% | 51,34% |
| Marginalskattur í nýggju skattaskipanin (2012) við gjøldum | 44,96% | 44,96% | 48,71% | 48,71% | 53,71% |

Føroya Arbeiðsgevarafelag kann við hesum staðfesta, at nýggja skattaskipanin hevur givið øllum skattaborgarum lægri skattatrýst. Eisini fáa allir lønmóttakarar meira burturúr teimum lønarhækkingum, sum koma í framtíðini.

## Hvat sigur vinnan um broytta skattin?

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur spurt nakrar av limunum, hvørja ávirkan skattalættin hevur havt fyri møguleikarnar at fáa arbeiðsmegi til vega, harundir um hugurin hjá fólki at arbeiða meira, er øktur. Spurdu fyritøkurnar eru umboðandi fyri allar vinnugreinar og bæði stórar og smáar fyritøkur.

Flestu fyritøkurnar siga seg merkja, at tað er lættari at fáa fólk at arbeiða, og at tað eru fleiri, sum bjóða seg fram. Serliga vísir tað seg, at tey, sum eru í arbeiði, eru grammari eftir at fáa fleiri tímar, og tosið um, at tað ikki loysir seg at arbeiða yvir, er manað í jørðina.

Tað eru tó eisini einstakar fyritøkur, sum ikki merkja mun. Serliga innan økið við høgt útbúnari arbeiðsmegi.

Uppá spurningin um broytingin í skattaskipanini hevur økt møguleikan at skaffa útbúna arbeiðsmegi, siga fyritøkurnar, at her er eingin broyting, og at tað helst kemur av, at fyritøkurnar ikki hava havt tørv á at seta útbúgvið fólk í starv í løtuni.

Annað sjónarmið, sum greitt kom fram, er, at fyritøkurnar merkja øktan eftirspurning frá sínum kundum. Hetta er galdandi bæði fyri handilsvinnuna og handverksvinnuna.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at í samband við, at skattaskipanin nú er broytt

er sera umráðandi, at skipanin fær loyvi til at standa sína roynd, soleiðis at langtíðar virknaðurin fær loyvi at vísa seg.

## Kommunuskatturin

Kommunuskatturin er framvegis tann sami, og fyri nógvar borgarar hevði ein lækking av kommunuskattinum gjørt stóran mun. Kommunurnar hava hækkað skattin munandi seinastu árini, og ávirkar tað keypiorkuna hjá borgarunum og søluna hjá vinnulívinum neiligt. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tískil til, at kommunurnar frameftir nýta kommunuskattin sum eitt tilvitað amboð at draga borgarar og vinnu at sær.

## Nýtslugjøld

Við tí endamáli at lækka skattin á lønarinntøku eiga bæði land og kommunur at umhugsa, um tey ikki eiga at áseta fleiri nýtslugjøld fyri tænastur, soleiðis at hesar ikki skulu fíggjast yvir skattin. Hetta eigur at vera gjørt fyri at breiðka skattagrundarlagið, soleiðis at møguligt verður at lækka kommunuskattin. Hetta hevði eisini givið øktar inntøkur til kommunur, har lutfalsliga nógvir løntakarar við serligum skattafyrimunum eru, og soleiðis kundu kommunurnar fingið allar borgarar at rinda fyri veittar tænastur.

Fleiri nýtslugjøld høvdu eisini verið við til at lækka almennu útreiðslurnar, soleiðis sum brátørvur er á. Nýtslugjøld hava ta ávirkan á atburðin hjá borgarunum, at tá gjaldast skal fyri almennu tænasturnar so hvørt, aftrar borgarin seg við at brúka tænasturnar í ov stóran mun. Tískil fellur eftirspurningurin eftir tænastum, og land og kommunur kunnu rationalisera tilsvarandi.

Borgaratænastur hjá kommununum, sum eru væl egnaðar at taka gjøld fyri, eru tænastur so sum vatn, renovatión o.l. Fyri landið verður hugsað um, at t.d. heilsutrygd og Kringvarpsgjaldið ikki verða umløgd til skattafíggjaði gjøld, men framhaldandi verða fíggjaði sum brúkaragjøld. Somuleiðis eigur ein útgreining eigur at verða gjørd, har hugt verður eftir, hvørjar aðrar almennar tænastur eru væl egnaðar til at verða fíggjaðar við brúkaragjaldi. Ansast má tó eftir, at umsitingin av einum nýtslugjaldi ikki gerst ov stór, so nyttan avmarkast.

Tilmæli

- At virknaðurin av skattanýskipanini fær loyvi til at standa sína roynd
- At kommunuskatturin verður lækkaður
- At áseta fleiri nýtslugjøld fyri tænastur frá landi og kommunum, sum ein liður í at lækka skattin á arbeiði.

# Mál í 2010 og 2011

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

- Hin 20. oktober 2011 vóru nýggju vinnusjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag løgd fram undir yvirskriftini "Koyri so á motorin". Vinnusjónarmiðini eru grundleggjandi og langsigtaðu støðurnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í mun til vinnupolitik og onnur yvirskipaði samfelagsviðurskifti, sum ávirka teir karmar, vinnan arbeiðir undir. Vinnusjónarmiðini eru tøk á www.industry.fo.

- Vinnufelagslógirnar vórðu dagførdar í 2008, og regluligar dagføringar eru gjørdar síðani. Føroyska vinnulóggávan er nú í tráð við vinnulóggávuna í grannalondunum. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við hesum dagføringum, tí tað hevur týdning, at samsvar framhaldandi verður millum føroyska lóggávu og lóggávu í londunum kring okkum.

- Í fleiri ár hevur verið arbeitt við eini pensjónsnýskipan, sum skal føra við sær, at tvungin eftirlønaruppsparing verður sett í verk fyri allar føroyingar. Í ársfrágreiðingum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2007, 2008 og 2009 varð sagt, at tað sá út til, at uppskot um hetta fór at verða lagt fyri tingið í næstum. Pensjónsnýskipan er tó framvegis ikki framd, men sitandi samgonga hevur sett sær fyri at fremja hetta mál.

- Seinastu árini eru fleiri lógir og kunngerðir, sum áleggja vinnuni fleiri gjøld, lagdar fyri løgtingið. Somuleiðis er onnur lóggáva dagførd soleiðis, at gjøld eru hækkað. Hetta hevur serliga rakt alivinnuna og fíggjargeiran. Í 2010 varð álagt fiski- og alivinnuni at gjalda ein sokallaðan tilfeingisskatt, sum verður roknaður av ársúrslitinum av meira enn einari mió. kr. í 2011. Av hesum úrsliti verða 2,5 % kravd í skatti. Hesi falla til gjaldingar tríggjar ferðir um árið.. Lógin varð ætlað bert at verða galdandi í 2011, men varð seinni broytt til eisini at fevna um 2012. Løgtingið hevur fyri kortum samtykt gjald á fiskiskap eftir makreli, og hevur eisini fráboðað, at komandi ár verða tilfeingisgjøld løgd á allan fiskiskap.

- Umfatandi lóggáva er sett í gildið innan fíggjarøkið seinastu árini. Hetta er gjørt sum ein dagføring av føroysku lóggávuni og fyri at fáa føroyska lóggávu á økinum at líkjast meira ES-lóggávu. Harafturat eru sokallaðir bankapakkar settir í verk, sum hava spent eitt trygdarnet undir peningastovnarnar í danska ríkinum.

- Vinnumálaráðið hevur arbeitt við at orða ein innkeyps- og útboðspolitikk. Endamálið við hesum er at fáa skipað alment innkeyp og alment útboð eftir einum leisti, sum er til fyrimuns fyri vinnu og land. Tað er enn ikki fráboðað, at politikkurin er settur í verk, men Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið arbeiða við hesum.

- Uppskot um sokallaðu byggilógina og uppskot um tilbúgvingarlóg vórðu løgd fyri Løgtingið bæði næstseinastu og seinastu tingsetu, men vórðu ikki samtykt. Væntandi verða uppskotini løgd fram aftur komandi tingsetu. Byggivinnan hevur havt drúgvar viðmerkingar til uppskotini, men tekur undir við, at økini verða skipað betur.

- Skattanýskipan var framd undan jólum við virknaði frá 1. jan. 2012. Skattastigin er vorðin flatari, og marginalskatturin lækkaður. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við skattanýskipanini.

- Eftirlønir verða nú skattaðar við inngjaldi. Hetta var eisini ein broyting í kjalavørrinum av skattanýskipanini. Føroya Arbeiðsgevarafelag tók undir við hesum treytað av, at peningurin varð nýttur til íløgur til at skapa størri virksemi og sostatt inntøkur til landið.

# Sáttmálasamráðingar 2011-2012

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi.

Største sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafeløgini, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja tær støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingar í samráðingarrunduni 2010 - 2012

Eftir aðalfundin í fjør vóru nakrar sáttmálasamráðingar í undanfarnu samráðingarrundu eftir. Hesar vóru samráðingarnar við manningarfeløgini um sáttmálarnar fyri farmaskip, samráðingar við Maskinmeistarafelagið um maksinmeistarar á landi, samráðingar við Føroysk Miðlafólk og samráðingarnar við Flogskiparafelag Føroya. Niðanfyri verða úrslitini av hesum samráðingum lýst í stuttum.

## Samráðingar við Maskinmeistarafelagið um sáttmálan á landi

Hin 13. juni 2011 varð sáttmáli undirskrivaður við Maskinmeistarafelagið fyri teir maskinmeistarar, sum starvast á landi. Umframt smávegis broytingar í sáttmálatekstinum hevði semjan við sær eina hækking, sum svarar til tær hækkingar, sum í samráðingarrunduni 2010 – 2012 vóru á privata arbeiðsmarknaðinum, tað vil siga 3,62 % í sáttmálatíðarskeiðnum.

## Samráðingar við manningarfeløgini

Hin 30. juni 2011 skrivaðu Reiðarafelagið fyri Farmaskip og tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maksinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag undir nýggjar 2-ára sáttmálar. Sáttmálarnir eru galdandi fram til 1. mars 2013. Eisini henda semjan hevði við sær eina hækking, sum svarar til tær hækkingar, sum annars vóru í samráðingarrunduni 2010 – 2012, tað vil siga 3,62 % í sáttmálatíðarskeiðnum.

## Samráðingar við Føroysk Miðlafólk

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk undirskrivaðu 7. november 2011 nýggjan 2-ára sáttmála. Sáttmálin er galdandi til 1. november 2013. Umframt smærri tillagingar í sáttmálanum, hevði semjan við sær eina lønarhækking á 0,82 % hin 1. november 2011 og 1,97 % hin 1. november 2012, og eina eftirlønarhækking á 0,5 % hvørt árið. Hækkingarnar eru sostatt á sama støði sum hinar semjurnar í samráðingarrunduni.

Føroya Arbeiðsgevarafelag yvirtók sáttmálan við Føroysk Miðlafólk 1. apríl 2011, og var hetta sostatt fyrstu ferð, at Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk skrivaðu undir sáttmála.

## Samráðingar við Flogskiparafelag Føroya

Fyri sáttmálan millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya varð fyrst gjørd ein 1-ára semja í 2011. Hin 10. apríl 2012 varð so semja undirskrivað fyri seinna árið í samráðingarrunduni. Úrslitið av báðum samráðingunum varð eisini í mun til hendan sáttmálan á sama støði sum hinir sáttmálarnir í samráðingarrunduni. Sáttmálin er galdandi til 1. apríl 2013, og við hesi semju vóru allir sáttmálarnir í samráðingarrunduni, sum byrjaði í mai 2010, komnir uppá pláss.

## Samráðingarrundan 2012 – 2014 er byrjað

Nýggj samráðingarrunda byrjaði við samráðingunum við arbeiðarafeløgini um sáttmálarnar, sum gingu út hin 1. mai 2012.

Samráðingarnar hesuferð gingu heilt væl, og Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at til bar at koma á mál, uttan at neyðugt varð at tilkalla semingsmann. Hetta er greitt tekin um, at samráðingarpartarnir hava tikið bæði samráðingar- og samfelagsstøðuna í álvara, og hava víst ábyrgd í mun til hetta.

Partarnir, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, skrivaðu hósdagin 3. mai undir nýggjan 2-ára sáttmála. Umframt ávísar broytingar og tillagingar í sáttmálunum høvdu sáttmálarnir við sær eina lønarhækking 1,27 kr 1. mai 2012 og 1,85 kr 1. mai 2013. Hetta hevði sostatt við sær ein samlaðan karm á 1,13 % fyrsta árið og 1,89 % annað árið.

Stutt eftir hesar samráðingar, hin 15. mai, undirskrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið sáttmála galdandi fyri

maskinmeistarar á landi. Eisini hesin sáttmáli var ein 2-ára sáttmáli, sum gongur frá 1. juni 2012 til 1. juni 2014, og hevði semjan við sær somu hækkingar sum fyri arbeiðarafeløgini.

Karmurin fyri samráðingarrunduna 2012 – 2014 er sostatt lagdur á 1,13 % fyrra árið og 1,89 % seinna árið.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sum nevnt er gjørd semja um nýggjar sáttmálar við tey fimm arbeiðarafeløgini og við Maskinmeistarafelagið. Tað vil siga at teir flestu sáttmálarnir í samráðingarrunduni 2012 – 2014 eru eftir. Hesir sáttmálarnir eru (undirsáttmálar og sersáttmálar eru ikki nevndir):

| | |
|---|---|
| 1. oktober 2012 | Sáttmálarnir við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna fyri handverkarar og fyri flogmekanikarar. |
| 1. november 2012 | Sáttmáli við Súluna fyri flogternur. |
| 1. januar 2013 | Sáttmálarnir við Starvsmannafelagið fyri starvsfólk á Føroya Tele og Posta. |
| 1. mars 2013 | Sáttmálarnir millum Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag fyri manningar fyri farma- og ferðamannaskipum. |
| 1. apríl 2013 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya fyri flogmenn. |
| 1. mai 2013 | Sáttmálarnir við YTF og Finansforbundet fyri starvsfólk í fíggjar- og tryggingargeiranum. |
| 1. mai 2013 | Sáttmálin við S&K fyri starvsfólk í skrivstovu- og krambayrkinum. |
| 1. mai 2013 | Sáttmálin millum Føroya Prentsmiðjufelag og Føroya Prentarafelag fyri prentarayrkið. |
| 1. oktober 2013 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk fyri miðlafólk í privata geiranum. |

# Tiltøk 2011-2012

## Vinnunám

Vinnunám er skeiðstænastan hjá Vinnuhúsinum. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðsgevarafeløgum undir hesum.

Upprunaliga endamálið við Vinnunámi var at vera við til at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, og eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Tað hevur tó víst seg, at tá skipað verður fyri yvirskipaðum skeiðum, sum ofta taka 2-3 dagar, er undirtøkan ikki stór. Hinvegin er áhugin stórur, tá skipað verður fyri kunningardøgum um meiri ítøkilig mál.

Vinnunám hevur sostatt lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta seinasta árið hevur verið skipað fyri skeiði í Byggiløgfrøði, tiltakið um Risk Management og betran av váðastøðuni, kunningartiltakið um arbeiðsloysisstuðul, barsilspening og sjúkradagpening og heimleiðisfundi um marknaðarføring á sosialu miðlunum.

## Vinnudagurin 2011

Hetta var 12. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

Dómsnevndin valdi P/F Vónin til Ársins Virki 2011. Grundgevingin hjá dómsnevndini var hendan:

“Gev einum manni ein fisk, og hann verður mettur fyri ein dag. Lær hann at fiska, og hann verður mettur fyri lívið.” Flestu okkara kenna helst hetta gamla orðatakið. Ein nýggjari útgáva av hesum orðataki skoytur uppí: “Lær ein mann at fiska, og tú kanst selja honum fiskireiðskap.”

P/F Vónin er Ársins Virki 2011. Gamla trolvirkið í Fuglafirði hevur seinastu árini støðugt ment seg, og er í dag ein týðandi aktørur á marknaðinum fyri trol, nótir og aðra útgerð til fiski- og alivinnuna um alla verðina. Fyritøkan er serliga aktiv í Norðuratlantshavi og hevur deildir í Newfoundlandi í Kanada og í Grønlandi, og kastaði í 2088 saman við norsku fyritøkuni Refa Frøystad Group (RFG) A/S. Í tí sambandinum varð móðurfelagið P/F VON stovnað, sum eigur P/F Vónina og RFG. Samanleggingin er ein náttúrligur liður í altjóða strategiini hjá Vónini og hevur styrkt um møguleikarnar hjá Vónini á altjóða marknaðinum. Altjóða útsýnið hjá Vónini sæst eisini, um tú vitjar heimasíðuna hjá Vónini, sum bara finst á enskum máli.

Dugnaliga leiðslan og starvsfólki á P/F Vónini hava eisini dugað so sera væl at brúkt sínar styrkir fyri at vinna nýggjar marknaðir. P/F Vónin hevur økt um sítt tilfeingið á marknaðinum við at flyta sínar førleikar frá traditionellu fiskivinnuni til alivinnuna. Seinastu árini hevur P/F Vónin eisini víst áhuga fyri oljuvinnuni og vænta vit, at eisini har kemur felagið at gera seg galdandi.

Búskaparligu úrslitini hjá P/F Vónini hava verið góð og støðug. Fyritøkan hevur seinastu árini megnað at skapa eitt yvirskot á hvørjum ári, eisini í teimum árum, har altjóða fíggjar-og búskaparkreppan hevur herjað, og í mongum fyritøkum vent eitt avlopi hall. Vónin hevur tó stýrt beint gjøgnum brotasjógvarnar í altjóða búskapinum, og hevur klárað at forrentað eginpeningin. Eginpeningsavkastið var 15% í 2010.

Sølan hjá Vónini er økt seinastu árini, og fór í 2010 upp um 100 mió. kr. Vøksturin í søluni í 2010 stavar frá øktari sølu uttanfyri landoddarnar, hóast fyritøkan enn selur meira innanlands enn uttanlands.

Vónin hevur í nógv ár arbeitt við menning av sínum vørum og tænastum í tøttum samstarvi við fiskivinnuna og aðrar tænastuveitarar til fiskivinnuna. Vónin hevur eisini verið við til at fíggja ph-d lestur innan uppisjóvartrol og hevur í nógv ár arbeitt tætt saman við Havstovuni í menningarverkætlanum. Tað ber til at royna nýggj hugskot og nýggjar vørur við teldusimuleringum og í stóra royndartanganum hjá Vónini, áðrenn tær verða royndar undir veruligum umstøðum. Hesin dentur á gransking og menning hevur borið ávøkstur, og vørurnar hjá Vónini eru eftirspurdar víða hvar, ikki bert í Norðuratlantshavi.

Starvsfólkatalið hjá fyritøkuni er støðugt økt, og í 2010 starvaðust í miðal 62 starvsfólk hjá P/F Vónin.

P/F Vónin hevur sum tað fyrsta virkið vunnið heiðurin sum Ársins Virki tvær ferðir, fyri fyrstu ferð í 2002.

Dómsnevndin heldur, at Vónin hevur uppiborið hendan heiðurin gjøgnum tað miðvísa arbeiði, sum fyritøkan hevur lagt í at menna sínar vørur, at menna teir marknaðir, sum Vónin virkar á, eitt miðvíst samstarv við onnur og ikki minst gjøgnum tey búskaparligu úrslit, sum fyritøkan hevur rokkið."

Ársins Átak 2011 var Jákup Zachariassen. Heiðurin fekk hann fyri framleiðsluna av fløguni av Russ Taff. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:

"Føroysk tónleikaframleiðsla hevur seinnu árini flutt seg frá at vera eitt frítíðarítriv í einum kjallara, til at vit í dag hava fleiri professionel innspælingarhøli, og fleiri føroyskir tónleikaframleiðarar hava samstundis ment seg, so tað í dag eru fleiri sera dugnaligir tónleikaframleiðarar, sum bjóða seg fram.

Ein av hesum sera dugnaligu tónleikaframleiðarum kom á einum tónleikafestivali í Føroyum í samband við eina heimsstjørnu innan sína tónleikagenru. Ein tónleikari, sum hevur selt milliónir av fløgum kring allan heim. Áðrenn nakar vardi av, varð hugskotið um at spæla inn og framleiða eina fløgu í Føroyum ment, og aftaná eina tíð, varð farið undir arbeiði. Fleiri av sangunum á fløguni eru skrivaðir av føroyskum tónleika- og orðasmiðum og er fløgan framleidd av føroyskum tónleikaframleiðarum. Saman við einari amerikanskari heimsstjørnu og einum altjóða tónleikaforlagið og distrubutøri hevur hettar verið grundarlagið undir fløguni "Faroe Islands" hjá Russ Taff.

Við hesari fløguni hevur føroysk tónleikaframleiðsla við Jákup Zachariassen á odda víst, at tað ber til at fáa altjóða tónleikarar hendan vegin at spæla inn, og dómsnevndin heldur, at tað er eitt átak, sum lýkur treytirnar fyri at verða ársins átak.

Millum øll tey mongu góðu átøkini í landinum, er dómsnevndin sannførd um, at hon hevur valt rætt við at heiðra Jákup Zachariassen fyri framleiðsluna av fløguni við Russ Taff sum ársins átak 2011."

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Fiski- og flakavinnan*

### Útflutningurin

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum var í 2011 góðar 4,5 mia. kr., í mun til góðar 4,2 mia. kr. í 2010. Um sæð verður burtur frá útflutninginum av laksi og sílum (alivinnan), var útflutningsvirðið á øðrum fiskasløgum uml. 2,9 mia. í mun til 2,8 mia. kr. í 2010. Talan var sostatt bert um ein lítlan vøkstur í útflutningsvirðinum. Orsøkin til, at útflutningsvirðið hækkaði er serliga økti makrelútflutningurin og hægri fiskaprísir enn í 2010.

Eftir at samlaða útflutta nøgdin minkaði frá 2007-2009, øktist útflutta tonsatalið aftur í 2010. Í 2011 minkaði tonsatalið nakað aftur, og tað hevði minkað uppaftur meira, um ikki nøgdin á makreli vaks so nógv. Einasti týðandi vøkstur í tonsum var í útflutninginum av makreli.

Útflutningsvirðið av toski kvinkaði niðureftir, úr 525 mió. kr. niður í 513 mió. kr. Hóast størri minking í nøgdini varð útflutningsvirðið hildið uppi av einum frægari miðalprísi enn í 2010.

Tað hevur seinastu árini verið trupult at selt virkaða føroyska hýsu uttanlands, tí hon ikki verður veitt burðardygt, og hetta sæst aftur í hagtølunum. Sostatt helt útflutningurin av virkaðari hýsu fram at minka, og var í 2010 bert ein viðfáningur av tí, hann var nøkur fá ár frammanundan.

### Rávørutilgongdin

Talvan niðanfyri vísir, at nøgdin í føroysku feskfiskaveiðuni minkaði nógv í 2011.

Feskfiskaveiðan var í 2011 gott 85.000 tons, sum er heili 21.000 tons minni enn í 2010. Nøgdin av vanligu botnfiskasløgunum minkaði fyri sætta árið á rað, og var nógv tann lægsta síðani aldarskiftið. Talan var um minking í øllum botnfiskasløgunum, og var nøgdin av upsa aftur 13.000 tons minni í 2011 í mun til 2010. Upsafiskiskapurin er tí minkaður við einari helvt seinastu tvey árini, hóast stovnurin sigst verða væl fyri.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú minkaður í sjey ár á rað. Veiðinøgdin í 2003 var knøpp 25.000 tons, meðan hon í 2011 bert var góð 3.000 tons.

Samlaða avreiðingarvirðið av feskfiskaveiðuni var uml. 828 mió. kr. í 2011 í mun til 903 mió. í 2010. Miðal avreiðingarprísurin var fyri øll fiskasløgini hægri í 2011 í mun til 2010, og avreiðingarvirðið minkaði tí ikki líka nógv sum nøgdirnar.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2010** | **2011** | **2010** | **2011** | **2010** | **2011** |
| **Toskur** | 13.807 | 12.142 | 193.088 | 185.253 | 13,98 | 15,26 |
| **Hýsa** | 4.907 | 3.357 | 55.490 | 42.124 | 11,31 | 12,55 |
| **Upsi** | 40.205 | 27.557 | 294.254 | 252.797 | 7,32 | 9,17 |
| **Annar botnfiskur** | 15.367 | 12.764 | 140.665 | 122.433 | 9,15 | 9,59 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.459 | 4.518 | 110.925 | 123.074 | 24,88 | 27,24 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 27.242 | 24.771 | 108.927 | 102.286 | 4,00 | 4,13 |
| **Veiðan tilsamans** | 105.987 | 85.108 | 903.349 | 827.967 | | |

Kelda: www.hagstova.fo

### Flakavinnan

Minkandi nøgdirnar av botnfiski seinastu árini eru eisini ein stór avbjóðing hjá føroysku flakavirkjunum.

Ikki allir roknskapir fyri 2011 hjá flakavirkjunum eru tøkir enn, og hugt er tí eftir tølunum fyri 2010. Yvirlitið fevnir bert um feløg í Ráfiskakeyparafelagnum, har teir týðandi ráfiskakeypararnir eru limir. Sum heild kann

sigast, at úrslitini hjá feløgunum eru nakað frægari í 2010, enn tey vóru í 2009.

Um hugt verður eftir ársúrslitunum hjá fyritøkunum undir einum, var tilsamans talan um avlop fyri hesar 15 fyritøkurnar.

Á myndini niðanfyri sæst ársúrslitið áðrenn óvanligar postar og skatt hjá 15 fyritøkum. 10 fyritøkur hava avlop, meðan 5 hava hall.

**Arsúrslit hjá 15 fyritøkum í fiskiídnaðinum í 2010**




Kelda: www.vinnuvitan.biz

# *Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu*

## Fiskiskapurin

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2011/2012 skrivaði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at eftir í fleiri ár á rað at hava havt vánaliga tilgongd, er nú ein yvir miðal árgangur (2008) á veg, og at tilgongdin í 2009-11 var heldur frægari enn árini 2003-2007.

Havstovan mælti til, at hesir árgangir fáa frið at seta til, og at uppvakstrarøkini nær landi og aðrastaðni fáa frið í mest møguligan mun. Mælt verður til at banna allari veiðu á Føroya Banka.

Hýsustovnurin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hóast útlit eru til, at tilgongdin í 2011 verður heldur frægari (2009 árgangurin), er hetta tó enn bert helvtin av einari miðal tilgongd. Havstovan heldur, at rættast hevði verið at bannað allari beinleiðis veiðu eftir hýsu og at minka um hjáveiðu av hýsu í øðrum fiskiskapi, tó at hetta er trupult, tí hýsa verður fyri tað mesta veidd í blandaðum fiskiskapi.

Upsastovnurin verður mettur at vera væl fyri og gýtingarstovnurin at vera hægri enn minstamarkið hjá ICES. Hinvegin skrivar Havstovan, at veiðutrýstið eftir upsa er 38 % størri enn tað, sum mælt verður til.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at fiskidagaskipanin verður stillað rætt við at minka líðandi um dagatalið, tí at hetta hevði havt gagnliga ávirkan á allar tríggjar stovnarnar.

Samanumtikið eru útlitini fyri fiskiskapin eftir toski og hýsu ikki góð, og tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av toski og hýsu ikki verður størri í 2012 í mun til 2011.

Upsastovnurin verður sagdur at vera væl fyri, og higartil í 2012 hevur upsafiskiskapurin verið nakað betri enn í 2011. Veiðitrýstið er tó framvegis høgt, og útlitini fyri nøgdunum av upsa eru tískil torfør at meta um.

## Marknaðurin

Gongdin seinastu árini hevur verið, at tað er alsamt torførari at selja fiskavørur, um tað ikki kann skjalprógvast, at veiðan er burðardygg. Henda gongd gerst alsamt týðiligari, og tað er eingin ivi um, at hetta er ein stór avbjóðing fyri føroysku fiski- og flakavinnuna. Seinasta árið hava vit m.a. sæð, at fleiri íslendskar fyritøkur hava fingið góðkent sína veiðu sum burðadygga. Um alsamt fleiri av okkara kappingarneytum fáa góðkent veiðuna sum burðardygga, kunnu vit

gerast munandi verri fyri í kappingini við aðrar fiskiveiðutjóðir.

Tað er tí umráðandi, at fiskiskapir verða góðkendir sum burðardyggir, og at orka verður løgd í at marknaðarføra føroysku fiskiveiðuskipanina sum heild uttanlands.

## Alivinnan

Alivinnan er framvegis væl fyri, og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Gongdin seinastu árini hevur verið, at alsamt færri feløg eru í vinnuni. Um ársskiftið 2009/2010 vóru fimm feløg í alivinnuni, og í 2012 eru fýra alifeløg. Karmarnir um alivinnuna eru góðir, og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Góðir karmar og nærlagni tryggja, at alivinnan í dag er burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið samanborið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili.

Framleiðslan av laksi í 2011 var góð 60.000 tons í rundari vekt, og hetta er ein vøkstur uppá umleið 15.000 tons samanborið við 2010, tá 45.000 tons vórðu framleidd. Sostatt er samlaða framleiðslan aftur komin upp á sama støði, sum hon var á í 2009.

Søluvirðið í 2011 var 1,62 mia.kr., meðan søluvirðið í 2010 var 1,48 mia.kr.

Samanumtikið hevur 2011 verið eitt gott ár við øktari framleiðslu. Í 2012 verður mett, at útboðið á heimsmarknaðinum fer at økjast við umleið 15%, og vit kunnu vænta, at føroyska framleiðslunøgdin verður eitt vet hægri enn í 2011.

Í 2012 verður mett, at tøkan í Føroyum verður eitt lítið vet hægri enn í 2011, tvs. góð 60.000 tons í rundari vekt. Prísurin fer helst at fella nakað í 2012, og tí er væntandi, at útflutningsvirðið í 2012 verður lægri enn í 2011.

Prísurin á laksi hevur verið javnt høgur í 2009, 2010 og fyrra helming av 2011 orsakað av vaksandi eftirspurningi á heimsmarknaðinum, og tí at framleiðslan í Kili hevur verið lág. Torført er at meta um langtíðarútlitini, men greiðar ábendingar eru um, at útboðið økist, og at prísurin tí fer at vera lægri í 2012, enn hann var í 2010 og fyrst í 2011.

Í 2011 vóru 12,1 mió. Smolt sett út, og tað er ein minking samanborið við 2010, tá 14,5 mió. smolt vórðu sett út. Síðan 2010 eru eingi síl sett út.

**Tøka av laksi og sílum 1996-2011 (rund vekt)**




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,440 | 1,260 | 3,292 | 1,315 | 3,126 | 11,14 | 10,22 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 |
| Laks | 17,66 | 20,31 | 19,18 | 39,25 | 33,51 | 46,01 | 44,95 | 52,53 | 40,99 | 18,96 | 13,08 | 22,31 | 38,85 | 51,50 | 45,41 | 60,49 |

Kelda: Avrik við Rúna Dam

## Útflutningsvirðið

Myndin niðanfyri vísir, at útflutningsvirðið á alifiski er økt nógv seinastu árini. Útflutningsvirðið á alifiski í 2003 var eina slaka milliard. Í 2005 og 2006 varð útflutningsvirðið minkað niðurum hálvu milliardina fyri síðani at økjast ár fyri ár fram til og við 2011. Í 2009 var útflutningsvirðið slakar 1,4 milliardir krónur, og hóast tøkan í 2010 varð væl lægri enn fyri 2009, var útflutningsvirði eitt vet hægri. Í 2011 var útflutningsvirðið meira enn 1,6 mia. kr., og so høgt hevur útflutningsvirðið av alifiski ongantíð verið áður.

Prísurin á alifiski hevur sveiggjað nógv í 2011. Marknaðarprísurin á laksi fall úr góðum 40 krónum í mars niður í 25 krónur fyri kilo í oktober. Hóast hesi sveiggj endaði samlaða útflutningsvirðið omanfyri 1,6 mia. kr.

**Útflutningur av alifiski í virði frá 2003 til 2011 (1000 kr.)**




Kelda: www.hagstova.fo

Útlitini komandi tíðina verða mett at vera hampiliga góð, hóast prísurin væntandi fer at fella nakað. Framleiðslan hjá Kili fer nú av álvara at økjast, og tí kunnu vit vænta, at prísurin fer at fella nakað í 2012 og 2013.

Alivinnan fór í 2010 undir eitt felags marknaðarføringsátak kallað Salmon from the Faroes.

Átakið fevnir um at gera marknaðarføringstilfar, sum lýsir føroysku alivinnuna, skipaða luttøku á altjóða fiskavørumessum og onnur tiltøk, sum kunnu seta føroyska alivinnu á heimskortið. Alivinnan er samd um at halda fram við átakinum í 2011 og 2012.

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í handverksvinnuni

Seinastu tvey árini eru lønargjaldingarnar í byggivinnuni lækkaðar við meira enn einum fimtingi.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í lønargjaldingum innan byggivinnuna frá 2006 til 2011. Myndin vísir, at útgoldnu lønirnar eru kvinkaðar upp úr 761 mió. kr. í 2010 til 766 mió. kr. í 2011.

Handverksparturin av samlaðu lønargjaldingunum er eins og árið fyri 11,2% av samlaðu lønargjaldingunum.

**Lønarútgjaldingar í byggivinnuni 2006-2011**

| Vinnugrein | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 139,2 | 161,4 | 162,0 | 131,8 | 127,9 | 130,1 |
| Ídnaður annars | 234,1 | 249,0 | 252,3 | 236,6 | 218,3 | 207,0 |
| Bygging | 455,3 | 511,4 | 542,0 | 449,3 | 414,5 | 428,3 |
| *Tilsamans* | **828,7** | **921,8** | **956,3** | **817,7** | **760,7** | **766,8** |
| | | | | | | |
| **% av samlaðum lønarútgjaldingum** | 12,9% | 13,3% | 13,6% | 12,2% | 11,2% | 11,2% |
| % vøkstur í lønarútgj, handverksvinnan | 11,8% | 11,2% | 3,7% | -14,5% | -7,0% | 0,8% |

Kelda: www.hagstova.fo

Um hugt verður eftir løntakarum heldur enn lønarútgjaldingum, er talið á løntakarum í byggivinnuni sambært upplýsingum frá Hagstovuni aftur minkað eitt sindur í 2011. Seinastu fýra árini er talið á løntakarum í byggivinnuni minkað við næstan einum fjórðingi.

Bæði samlaðu lønarútgjaldingarnar og talið av løntakarum vísir sostatt, at byggivinnan hevur verið fyri ógvusligum bakkasti síðan 2008, tá virksemið var av tí mesta.

Um hugt verður eftir innflutninginum av tilfari til byggivinnuna sæst sama gongd.

Á myndini niðanfyri sæst, at eftir at virðið á innflutninginum lækkaði undanfarnu árini, var í 2011 ein lítil vøkstur í mun til árið fyri. Talan er tó framvegis um eitt lágt tal, um samanborið verður við miðal innflutningin higartil í hesari øldini.

**Innflutningur av tilfari til byggivirksemi**




Kelda: www.hagstova.fo

Tað er eingin fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting, og besta ábendingin um, hvussu nógv sethús eru bygd í einum ávísum ári, fæst tí við at hyggja eftir skrásetingum hjá SEV, viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið. Henda skráseting er bólkað í sethús og "annað", sum fevnir um vinnu- og almennar bygningar, íbúðir, neyst, úthús o.a., umframt víðkanir viðvíkjandi verandi innleggingum.

Myndin niðanfyri vísir, at frá 2001 til 2006 lá talið av nýbygdum sethúsum rættuliga støðugt á 160-170 eindum. Árini 2007 og 2008 vaks talið á nýbygdum sethúsum, hevur minking verið í talinum á hvørjum ári.

Í 2011 var talið á sethúsum og øðrum nýbyggingum tað lægsta síðani aldarskiftið.

**Nýbygging 2000 - 2011**




Kelda: www.hagstova.fo

## Útlit fyri handverksvinnuna

Fíggjar- og búskaparkreppan seinastu árini hava haft við sær, at virksemið í samfelagnum sum heild er minkað, og hetta hevur eisini rakt handverksvinnuna. Tað hevur í slíkum tíðum stóran týdning, at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá tí almenna verður raðfest ovarlaga, so nakað av virksemi framhaldandi er í byggivinnuni.

Aðrastaðni sæst, at stjórnirnar seta í verk skipanir við skattafrádrátti, um privatfólk gera avtalur við handverksfyritøkur um at gera umbyggingar, viðlíkahaldsarbeiði v.m.

Vónandi fer tað almenna í staðin at økja um eftirspurningin hjá tí almenna eftir teimum neyðugu viðlíkahaldsarbeiðum á almennum bygningum v.m., sum tørvur er á at gera, heldur enn at bíða til privati eftirspurningurin aftur er vaksandi.

Sum heild eru útlitini hjá byggivinnuni fyri 2012 ikki tey bjartastu, og hjá nógvum fyritøkum snýr tað seg mest um at yvirliva, til tíðirnar verða betri. Nakrar størri byggiverkætlanir skulu tó eftir ætlan byrja í 2012, og um føroysk byggivinna fær part í hesum, kann tað vera viðvirkandi til at venda gongdini í vinnuni og skapa positivar ringvirkningar í samfelagnum.

## *Shippingvinnan*

Talið av skipum, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, er nú komið uppá 69 skip. Við ársenda 2011 var talið 68, í 2010 var talið 47 skip og í 2009 33 skip. Hetta er eitt greitt tekin um, at skipanin er skilagott sett saman, og at hon er áhugaverd fyri reiðaríini. At so nógv skip nú eru skrásett í FAS-skipanini hevur sjálvsagt sína positivu ávirkan á avleidda virksemið og t.d. arbeiðspláss fyri føroyskar sjómenn.

Í ársfrágreiðing síni hevur Sjóvinnustýrið metingar av lønarútgjaldingum innan FAS og av beinleiðis inntøkum, sum eru avleiddar av FAS. Orsakað av, at tað ikki í øllum førum er møguligt at eyðmerkja FAS-atknýtt tøl úr roknskapum o.l., eru hetta varisligar metingar. Nevnast kann t.d., at partafelags- og tonsaskattur ikki er eyðmerktur hjá TAKS.

Metingarnar vísa, at lønarútgjaldingar til føroyingar við FAS-skipum og til umsiting av FAS (almenna og privata) koma upp á 245.439.111 krónur. Beinleiðis inntøkur av skatti, arbeiðsmarknaðargjøldum og avgjøldum av ymsum slag verða mettar til 48.881.410 krónur. Manningarskattir eru ikki íroknaðir. Afturat hesum verður mett, at trygging, ferðing, gisting, skeiðsvirksemi v.m. geva inntøkur á 39.500.000 krónur.

Við einum beinleiðis og óbeinleiðis inntøkuískoyti á yvir 300 millónir krónir er sostatt heilt greitt, at avleidda virksemið av FAS ikki bara eru snøklar, men at skipanin veruliga hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið.

Tí er týdningarmikið, at øll, sum vara av hesi skipan, leggja seg eftir at varðveita støðugar og góðar karmar um hana, soleiðis at føroyska altjóða skipaskrásetingin og harvið vinnan kring hesa hevur bestu gróðrarmøguleikar í framtíðini.

Eitt tekin um, at grundarlag er fyri eini góðari skipan, er, at umboð fyri altjóða sjóferðslufelagsskapin hjá ST, International Maritime Organization, IMO, við ársenda 2011 vóru á vitjan í Føroyum fyri at kanna, um Føroyar sum flaggstatur liva upp til sínar skyldur mótvegis IMO. Niðurstøðan hjá IMO skoðanarbólkinum var sera jalig og góð. Við bert tveimum minni frávikum hevur føroyska fyrisitingin fingið staðfest, at hon er sera væl fyri, umframt at tilgongdin hevur víst á styrkina við tøttum samstarvi millum ráð og stovnar.

Hetta er at fegnast um. Eisini er greitt, at Føroyar koma á hvítalista hjá ParisMou næstu ferð listarnir verða almannakunngjørdir seinni í summar. Føroysk umsiting og føroysk skip standa sostatt sterk í mun til altjóða krøv og standardir.

Framtíðar avbjóðingar hjá vinnuni eru m.a. at fáa manningar við skipunum. Føroyska vinnan hevur ilt við at klára seg í kappingini við útlendsk reiðarí um arbeiðsmegi. Tað er í hesum høpinum sera týdningarmikið, at myndugleikar og onnur, sum vara av skipanini, leggja seg eftir at taka møguligar skeivleikar millum føroyingar í Føroyum og føroyingar uttanlands t.d. í skattaskipanini burtur.

## KT-vinnan

Í 2011 hevur virksemið í KT-vinnuni verið á leið tað sama sum í 2010, hóast nakrar av afturmeldingunum eru, at 2011 var eitt nakað betur ár hjá KT-vinnuni enn 2010. Konsolidering hevur verið í KT-vinnuni tey seinnu árini. Hóast hetta síggjast nýggj minni virki spretta fram.

Fleiri virkir í KT-vinnuni hava boðað frá, at tað er torført at fáa vælútbúgvin KT fólk í KT-vinnuna í Føroyum. Tí hevur KT-vinnan fleiri ferðir alment vísa á, at ein ekspertskattaskipan eigur at verða sett í gildið í Føroyum, sum "lokkar" serfrøðingar til Føroya við skattalætta í eitt avmarkað tíðarskeið, eins og vit kenna tað úr øðrum Norðurlondum. Enn hava landsins myndugleikar ikki tikið hetta tilmæli til sín.

Annað mál av stórum týdningi er, at Føroyar fáa eina talgilda undirskrift. Ein slík talgild undirskrift kann vera við til at skapa vøkstur og rationaliseringar í samfelagnum. Tó hevur tað víst seg at ganga ógvuliga trekt at fáa fíggjarligt grundarlag til vega fyri at koma á mál við hesum.

## Samskiftisvinnan

Fíggjarkreppan, sum hevur leikað seinastu árini, hevur eisini merkt samskiftis- og lýsingarvinnuna. Í stuttum kann sigast at tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum tali av minni veitarum - í fleiri førum einstaklingavirkir.

Vegna væntandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at virksemið í 2011 liggur áleið á sama støði sum í 2010. Onkur hevur havt eftir umstøðunum fínt úrslit, meðan onnur hava havt hall.

Eftirspurningurin eftir tænastum frá hesi vinnugrein hava broytt seg nakað seinastu árini og er flutt frá vanligari lýsingarframleiðslu til meira ráðgeving. Somuleiðis verður meira fokuserað á online marknaðarføring.

Útlitini frameftir eru hampilig, og 2012 verður væntandi á sama støði sum í 2011.

## Handilsvinnan

Í 2011 var sølan í handilsvinnuni nakað betur enn í 2010. Nakrar av handilsfyritøkunum hava havt fín ársúrslit, meðan aðrar hava havt meira "vanlig" ársúrslit. Tíverri síggjast ikki nógv nýggj virkir spretta fram innan handilsvinnuna, og eru orsøkirnar óivað tær, at handilsvinnan forvinnur ov lítið í mun til søluna.

Sum tað framgongur av talvuni niðanfyri, er innflutningurin vaksin við 20 prosentum, svarandi til 903 mió. kr. frá 2010 til 2011, og er nú hægri enn innflutningurin var í 2008.

| Innflutningur (1.000 kr.) | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Allur innflutningur | 5.020.919 | 4.210.856 | 4.369.792 | 5.273.251 | 903.459 | 20,7% |

Kelda: www.hagstova.fo

Sølan av bilum plagar at vera ein ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina.

Seinnu árini hava bilasølurnar merkt, at eftirspurningurin er fallin munandi sum ein beinleiðis avleiðing av fíggjarkreppuni.

| Nýggj akfør seld | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stk. | 1.948 | 1.053 | 1.135 | 1.218 | 83 | 7,3% |

Kelda: www.akstovan.fo

Tað sær tó út til, at støðan er vorðin betri tey seinastu tvey árini. Sølan av nýggjum bilum í 2011 er vaksin nakað í mun til 2010, men liggur tó væl undir søluni í 2008.

## Drúgvar og hálvdrúgvar vørur

Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum stóð stórt sæð í stað í 2011 í mun 2010.

| Innflutningur (1.000 kr.) | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hálvdrúgvar nýtsluvørur | 200.243 | 167.890 | 166.642 | 166.825 | 184 | 0,1% |
| Drúgvar nýtsluvørur | 207.646 | 159.435 | 150.898 | 151.808 | 910 | 0,6% |

Kelda: www.hagstova.fo

Sambært greiningum, sum Vinnuhúsið hevur gjørt við at seta seg í samband við fyritøkurnar í vinnugreinini, sæst, at flestu fyritøkurnar hava havt ein støðugan umsetning frá 2010 til 2011. Hetta samsvarar eisini væl við innflutningstølini.

At kalla allar fyritøkur í vinnugreinini hava tálmað rakstrarútreiðslurnar á øllum økjum. Serliga marknaðarføringsútreiðslurnar eru skornar nógv, eins og lønarútreiðslurnar eisini eru minkaðar.

Higartil í 2012 hevur gingið hampuligt. Sølan í januar, februar og mars hevur ligið millum indeks 100-110. Tá indeksið er á 100 merkir tað, at sølan er tann saman sum undanfarna ár. Sambært fyritøkunum er marknaðurin ikki so óstøðugur, sum hann var í tíðarskeiðinum 2008 – 2010. Av tí at so lítið er fráliðið av 2012, er tó torført at meta um, hvørt niðurgongdin er steðgað, og tað er byrjað at ganga rættan veg.

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, er innflutningurin av matvørum øktur við trimum prosentum, svarandi til 15 mió. kr. frá 2010 til 2011.

| Matvøruvinna - detail | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Matur, drykkjuvørur og tubbak | 511.347 | 503.233 | 511.308 | 526.603 | 15.295 | 3,0% |
| Aðrar ódrúgvar nýtsluvørur | 261.122 | 242.641 | 242.227 | 250.284 | 8.057 | 3,3% |

Kelda: www.hagstova.fo

Flestu fyritøkurnar hava merkt ein javnan umsetning frá 2010 til 2011. Yvirhøvur er talan um eitt søluindeks millum 97-109 í 2011. Tað merkir, at fyri summar fyritøkur hevur 2011 boðað frá lítlari afturgongd, meðan tað eisini eru fyritøkur, sum hava havt ein vøkstur í mun til 2010.

Á sølusíðuni eru nógv tilboð, og keypa fólk meiri av hesum vørum í avbjóðandi tíðum. Brúkarin hevur eisini partvíst flutt seg frá at keypa í teimum dýraru handlunum til at keypa meira frá teimum handlum, sum eru kendir fyri at hava lægri prísir.

At kalla øll virkir hava tálmað rakstrarútreiðslurnar á øllum økjum eins og tey undanfarnu trý árini. Marknaðarførings-útreiðslurnar eru skornar nógv, eins og lønarútreiðslurnar eru minkaðar orsakað av, at fleiri ársverk eru spard burtur.

## *Ferðavinnan*

Fyri aðru ferð síðani 2003 eru hagtøl fyri ferðavinnuna tøk. Vinnugreinafelagið fyri ferðavinnuna hevur í 2010 og 2011 tikið stig til at fáa útvega hagtøl um føroyska ferðavinnu fyri at betra um grundarlagið undir avgerðum um ferðavinnuna framyvir. Somuleiðis er ein meting gjørd av umsetninginum í ferðavinnuni. Metingin vísir, at íkastið hjá ferðavinnuni er knappar 717 mió. kr. í 2011.

Øll tølini eru kunngjørd í ársfrágreiðingunum hjá Ferðavinnufelagnum frá 2010 og 2011.

Tá tikið verður saman um, er vøkstur í loftvegis flutningi av ferðafólki frá 2010 til 2011. Hjá Atlantic Airways var ein samlaður vøkstur á 4% í teirra ferðafólkatali, sum fyri tað mesta kemur av framgongdini í talinum av útlendskum ferðafólkum.

Talið av ferðafólkum um Vága Floghavn vaks við 2% frá 199.988 í 2010 til 203.499 í 2011. Ferðafólkatalið hjá Smyril Line fall harafturímóti við 7% í 2011 í mun til 2010. Hetta kemst serliga av afturgongdini av donskum ferðafólkum. Við

atliti til gistingar vísa samanløgdu tølini fyri omanfyri nevndu hotell og vallaraheim, at talið av gistingum vaks frá 70.020 í 2010 til 77.043 í 2011, tvs. eina framgongd uppá 10%, sí talvu.

| | 2010 | 201 |
|---|---|---|
| Gistingar | 70.020 | 77.043 |
| Index | 100 | 110 |

Kelda: Frágreiðing frá Ferðavinnufelagnum

Í mun til aðra gisting í summarhúsum, camping/telt og ból og bita eru tølini ov ófullfíggjað til at kunna siga annað enn, at talið av campingvognum um borð á Norrønu vaks frá 557 í 2010 til 780 í 2011. At enda kann sigast, at kunningarstovurnar, sum hava latið inn tøl, siga at talið á ferðafólkið, ið hava vitja tey í 2011, er fallið í mun til í 2010.

## Týdningurin av hagtølum

Tað er ein trupulleiki, at hagtølini innan ferðavinnuna ikki verða savnað inn og viðgjørd á Hagstovuni, sum við heimild í lóg kundi havt uppgávuna, og sum eisini hevur rættað serkunnleikan til at røkja uppgávuna professionelt.

Álítandi hagtøl eru sera týdningarmikil, tí tey vísa gongdina í vinnuni. Hagtøl eru grundleggjandi fyri avgerðir, sum skulu takast, og tað liggur eisini eitt viðurkennandi signalvirði í, at ein vinnugrein hevur nýtilig hagtøl.

Fyri tey, sum arbeiða innan ferðavinnu í Føroyum, eru hagtøl eitt týðandi amboð fyri tær avgerðir, ið skulu takast viðvíkjandi øllum frá áseting av málum, vørumenning og brandingstrategi.

Við árslok 2011 metir Ferðavinnufelagið, at uppgávan viðv. hagtølum felagsins vegna er at enda komin, og vónar tí, at Hagstovan tekur yvir.

## Nakrir glottar í 2011

Í 2010 vísti Føroya Arbeiðsgevarafelag á at neyðugt varð at umskipa almenna leiklutin innan ferðavinnuna. Í 2011 var Ferðaráð Føroya endurstovnað, og ferðavinnan flutt til Vinnumálaráðið at umsita saman við aðrari vinnu. Hetta er ein jalig tilgongd, og Føroya Arbeiðsgevarafelag vónar, at við hesum er grundarlag skapt fyri einum góðum og dynamiskum samstarvi millum vinnuna og almenna myndugleikan.

Nú er neyðugt at miðvíst verður arbeitt fyri at menna karmarnar fyri menning av føroysku ferðavinnuni, og at ein ferðavinnupolitikkur verður skipaður.

Flogbreytin í Vága Floghavn er nú longd frá 1.250 til 1799 metrar, og farstøðin er undir umbygging. Útbyggingin merkir, at flogvøllurin kann taka ímóti størri flogførum og harvið eisini fleiri ferðafólkum. Kappingarførið hjá føroyska flogvøllinum er avgerandi fyri, um kapping kemur á flogferðsluøkinum. Kostnaðurin av at nýta flogvøllin má tí avtakast ella minka munandi, so hetta ikki frameftir verður ein forðing fyri flogferðsluni.

# Peningastovnarnir

Peningastovnarnir hava stóra ávirkan á gongdina í samfelagnum, har ein tann týdningarmesta uppgávan hjá teimum er at umsita gjaldførið í samfelagnum. Tað verið seg at umsita privata- og vinnuliga uppsparing, ið verður lánt útaftur til privatpersónar og vinnuna tá teimum tørvar gjaldførið til eitt hvørt endamál. Tað vóru við ársenda í 2011 723 starvsfólk í teimum føroysku peningastovnunum. Talan er sostatt um eina stóra vinnugrein í føroyskum høpi.

## Gongdin hjá føroysku peningastovnunum

Føroysku peningastovnarnir hava havt møguleika at luttaka í øllum bankapakkunum, og fegnast teir sjálvsagt um, at hetta hevur verið møguligt.

Peningastovnarnir eru framvegis harmir um, at Løgtingið í desember 2009 samtykti at hækka lønarhæddaravgjaldið frá 5% til 10% til heimsins hægsta lønarhæddaravgjald. Gildiskoman var frá 1. januar 2010, og eru Føroyar nú eitt av trimum londum í heiminum, sum krevja eitt slíkt gjald.

Hetta hevur ført við sær, at starvsfólkatengdu útreiðslurnar hækkaðu við heili 5% hjá fíggjar- og tryggingarfyritøkunum í Føroyum og harvið gjørdust kappingarfortreytirnar enn verri. Um henda eykaútreiðsla ikki skal flytast yvir á kundan, er einasti háttur at minka um útreiðslurnar hjá fíggjarfyritøkunum at lækka lønarútreiðslurnar, og tað vil siga at lækka starvsfólkatalið.

Hetta skal síggjast í mun til, at peningastovnarnir frammanundan rinda partafelagskatt, A-skatt av lønum og netto mvg. Hartil skal sigast, at teir almennu grunnarnir hvørki rinda lønarhæddaravgjald, og í fleiri førum ikki rinda partafelagsskatt.

**Lønarhæddaravgjøld 2005 til 2011**

| DKK 1.000 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønarhæddaravgjald | 12.633 | 13.648 | 15.390 | 17.112 | 16.585 | 32.35. | 34.571 |
| Broyting | | 1.015 | 1.742 | 1.722 | -527 | 15.770 | 2.216 |
| Index | 100 | 108 | 122 | 135 | 131 | 256 | 274 |

Kelda: www.gjaldstovan.fo, Landsroknskapir 2005-2011

Talvan omanfyri vísir, at meðan peningastovnarnir rindaðu knappar 13 mió. kr. í lønarhæddaravgjaldi í 2005, so rindaðu teir í 2011 knappar 35 mió. kr. í lønarhæddaravgjaldi til landskassan.

**Útlán og innlán í peningastovnunum**




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útlán | 12.470.968 | 17.669.277 | 18.150.787 | 17.361.314 | 18.969.439 | 18.838.026 |
| Innlán | 12.019.882 | 13.721.512 | 14.452.832 | 14.538.402 | 17.641.437 | 21.520.417 |

Kelda: Ársroknskapir hjá peningastovnum

Útlánini hava stórt sæð staðið í stað tey seinastu tvey árini, hóast stórar niðurskrivingar í Eik Banka Føroya. Niðurskriving uppá útlán gongur í stóran mun upp við øktum útlánum í sambandi við, at BankNordik hevur keypt virkir upp.

Um hesar íløgur verða tiknar burtur, er talan um ein lægri útlánsvøkstur uppá uml. 3 mia. kr. í 2011 í mun til 2010.

Hetta kemst eisini av minkandi virksemi, umframt at hugurin at gera íløgur ikki er eins stórur, sum hann hevur verið. Harumframt vera tey galdandi lánini jú afturgoldin. Mett verður, at útlánini hjá peningastovnunum ikki fara at vaksa meira enn 0-5% í 2012.

Eftirstøðurnar mótvegis peningastovnunum hjá vinnuni og húsarhaldunum eru vaksnar nakað. Tó ikki meira enn mett var í 2010.

**Trotabúðarviðgerðir 2006 til 2011**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Áheitanir um trotabúðarviðgerð | 3319 | 3331 | 2747 | 4038 | 2993 | 2975 |
| Harav útpanting | 1828 | 2109 | 1113 | 1677 | 395 | 1363 |
| Tvingsilssølur av fastari ogn | | 6 | 7 | 13 | 12 | 38 |

Kelda: Hagtøl frá Føroya Rætti

Áheitanir um trotabúðarviðgerð ella innheinting umvegis fútarættin fall eitt vet í 2011. Í 2.975 førum gjørdust teir handlandi annaðhvørt samdir, gjørdu eina gjaldsavtalu ella gjørdi rætturin ein úrskurð.

Í 1.363 førum var ein niðurstøða tikin av fútarættinum, t.d. tikið pant í ognum. Hetta tal er væl hægri í 2011 í mun til í 2010. Sostatt bendir nakað á, at tað er vorðið torførari at gera semjur millum partar, ið eru ósamdir.

Talið av tvingsilssølum av fastari ogn vaks eisini lutfalsliga nógv í 2011 í mun til 2010.

## Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðarkarmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at arbeiða fyri:

- **Felags sáttmálum fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.

- **Vinnupolitiskum kørmum:** Vegna vinnuna verður arbeitt við, at ávirka allar lógir, kunngerðir og ásetingar annars, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðað í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.

- **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.

- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.

- **Fundir og orðaskifti fyri leiðslurnar innan vinnuna:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum, sum húsast saman í Vinnuhúsinum.

# Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 15 feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Niels Winther |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmálaspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Stefan í Skorini |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Mikkjal Joensen |
| KT-felagið | Gordon Rajani |
| Oljuvinnufelagið | Esther Dahl |
| Samskifti | Gordon Rajani |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Mette K. Kibsgaard |
| Felagið Peningastovnar | Gordon Rajani |
| Oljutingið | Mikkjal Joensen |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar fyri arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



**Bergur Poulsen, formaður**

Bergur Poulsen er stjóri á fiskamjøls- og fóðurfyritøkuni Havsbrún í Fuglafirði. Harafturat er Bergur nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum í føroyskum vinnulívi. Bergur hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Høgni Hansen, næstformaður**

Høgni Hansen er stjóri í heilsølufyritøkuni Poul Hansen. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá. Høgni Hansen hevur eisini verið nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið var avtikið.



**Kristoffur Laksá, nevndarlimur**

Kristoffur Laksá er saman við øðrum eigari í prentsmiðjuni Estra í Gøtu. Kristoffur er, umframt at hava samráðingarleiðsluna í samband við sáttmálasamráðingarnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, eisini næstformaður í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Magni Arge, nevndarlimur**

Magni Arge er stjóri í flogfelagnum Atlantic Airways. Magni er eisini nevndarformaður í Oljuvinnufelagnum umframt nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum innan føroysku ferðavinnuna. Magni hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1998.



**Jón Danielsen, nevndarlimur**

Jón Danielsen er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Jón Danielsen er nevndarlimur í Havnar Handverksmeistarafelag umframt nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Danielsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



**Atli Gregersen, nevndarlimur**

Atli Gregersen er saman við øðrum eigari av fyritøkunum Luna, Fútaklettur og Fiskavirkinum. Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkunum Luna og Fútaklettur. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011.



**Jóhanna á Bergi, nevndarlimur**

Jóhanna á Bergi er stjóri á flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Harumframt er Jóhanna nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Jóhanna hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2008.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY